# Fleiri konufólk skiljast enn mannfólk

HAGTØL
*Ingrid Bjarnastein*

Hagtølini í árbókini fyri Føroyar 2001 siga, at fleiri føroysk konufólk eru skild enn mannfólk. Í 1995 vóru 612 føroyskir menn skildir, meðan 648 føroysk konufólk eru farnar gjøgnum hjúnaskilna. Talið er síðani 1995 vaksið støðugt, men her skal tó eisini takast til eftirtektar, at fólkatalið í Føroyum eisini er vaksið síðani 1995. Í 1995 búðu 43.358 fólk í Føroyum og seinastu tølini frá árbókini siga, at í ár 2000 búðu 46.196 fólk í Føroyum. Harav vóru 728 skild mannfólk og 778 skild konufólk.

Í ár 2000 var meira enn helvtin av øllum føroyingum ógiftir. Av 46.196 íbúgvum vóru 24.354 stakir føroyingar. Tølini siga eisini, at nógv teir flestu ógiftu føroyingarnir eru mannfólk. Talið av ógiftum mannfólkum hevur síðani 1995 allatíðina ligið um 3000 omanfyri ógift konufólk. Her skal tó eisini viðmerkjast, at í ár 2000 vóru umleið 1500 fleiri mannfólk í Føroyum enn konufólk.

Hinvegin, so hava nógv fleiri konufólk í Føroyum mist teirra hjúnafelag enn mannfólk. Talið á einkjumonnum, hevur síðani 1995, ligið á góðum hálvtfimmhundrað einkjumonnum, meðan einkjurnar liggja beint omanfyri 2000. Her spælir livialdurin á mannfólki og konufólki kanska inn. Sagt verður jú, at konufólk liva longur enn mannfólk.

Nú vit hava tikið tølini fyri ógift, skild og einkjumenn og einkjur, so er kanska eisini passandi at taka tølini fyri gift. Tølini fyri giftar føroyingar siga, at mannfólk og konufólk liggja hampuliga jøvn. Javnasta árið er 1999. Tá vóru 8797 gift mannfólk og 8798 gift konufólk. Og til seinast í ár 2000 vóru tilsamans 17.861 giftir føroyingar. Harav vóru 8928 mannfólk og 8933 konufólk.

# Talið av persónbilum vaksandi

HAGTØL
*Ingrid Bjarnastein*

Bileftirlit Føroya hevur beint fyri jól sent út tíðindaskriv við hagtølum fyri skráseting av nýggjum akførum fyri januar – desember 2000 og 2001.

Hagtølini vísa, at talið av nýggjum persónbilum í Føroyum er vaksandi. Frá januar til desember í fjør vóru skrásettir 1298 nýggir persónbilar, meðan talið í ár liggur á 1508. Hinvegin er talið á skrásettum bilum í desember mánaða í fjør hægri enn talið fyri desember mánaða í ár. Í fjør vóru skrásettir 79 persónbilar, meðan í desember mánaða í ár vórðu 76 persónbilar skrásettir. Her er ein vøkstur uppá 210 bilar.

Eisini talið á vøruvognum og hýruvognum er vaksið síðani omanfyrinevnda tíðarskeið. Frá januar – desember 2000 vórðu skrásettir 306 vøruvognar, meðan sama tíðarskeið í ár vórðu 337 vøruvognar skrásettir. Í fjør varð 14 hýruvognar skrásettir, meðan í ár eru 21 hýruvognar vorðnir skrásettr.

Harumframt er samlaða talið av innfluttum brúktum akførum í 2001: 500 í mun til 200: 426. Hetta gevur ein vøkstur uppá 17,4%.

Samlaða skrásetingin av nýggjum og brúktum innfluttum akførum í 2001 var sostatt 2500 akfør í mun til 2164 í ár 2000. Hetta er ein vøkstur uppá 336 akfør, tilsvarandi 15,5%.

# Tíðindaskriv frá Føroya Fróðskaparfelag

**Fróðskaparrit 49 er komið**




Fyri stuttum kom Fróðskaparrit 48. bók, og longu nú kemur so Fróðskaparrit 49. bók. Hesa ferð rúmar ritið seks greinir við einari hugvísindagrein og trimum greinum um tara og tveimum um djórafrøði.

Eyðun Andreassen, professari á Føroyamálsdeildini á Fróðskaparsetrinum, hevur skrivað grein um Søgu og undirsøgu í Gongu Rólvs kvæði. Tulkingin av undirsøguni í kvæðinum er heldur øðrvísi enn roknað verður við.

Biofar hevur seinastu árini havt fast pláss í Fróðskaparritum til at kunna um avrik frá hesi stóru og týðandi verkætlan. Aftur í bók 49 eru 4 greinir, har ein snýr seg um dýrini armfótingarnar við Elsebeth Thomsens Brachiopada in the Faroe Islands area. Tríggjar greinir afturat fevna um alguvøkstur. Tann fyrsta er um reyðalgur, The Bangiophyte Species of the Faroe Islands eftir Juliet Brodie, Ruth Nielsen og Karl Gunnarsson. Koraltarar verða viðgjørdir í Caralline Red Algae (Corallinales, Rhodophyta) of the Faroe Islands eftir Susse Wegeberg, Ruth Nielsen og Karl Gunnarsson. At enda hava Ruth Nielsen og Karl Gunnarsson eisini skrivað um Seaweeds of the Faroe Islands. An annotated checklist, har øll tarasløgini eru greinað, og víst verður á hvar tey eru funnin. Allar tær lívfrøðiligu greinirnar hava fitt av myndum. Ikki minst tann seinasta, har Astrid Andreasen hevur teknað 35 tarasløg so frálíka væl, at tey eru løtt at kenna aftur. Hetta verður vónandi byrjanin til eina tarabók við lyklum at greina tarasløgini eftir.

Sven-Axel Bengtson, professari við lærda háskúlan í Lund, ið eisini undirvísir á Fróðskaparsetrinum, hevur skrivað seinastu greinina, Breeding distribution and numbers of wren (Troglodytes troglodytes) in the Faroe Islands. Í hesi grein verður músabróðir viðgjørdur.

Fróðskapar rit 49. bók er 163 blaðsíður. Haldaragjaldið er 165 krónur um árið, og nýggir haldarar kunnu tekna seg á: Setursskrivstovuni, Handan Á 5, Tórshavn, telefon 315302, telefaks, 318929 ella við telduposti á maudh@setur.fo Í leysasølu kostar ritið 195 krónur. Mentanargrunnur Landsins gevur Fróðskaparrit út, og Bókamiðsølan hevur søluna um hendur.

# Ormurin Langi á pall á Tvøroyri

**Tað er ikki ofta, at ein av okkara fremstu tónleikabólkum, Týr, er á palli, men í kvøld spæla teir í TB-húsinum á Tvøroyri**

KONSERT
*Áki Bertholdsen*

Í kvøld verður eitt sjáldsamt høvi at hoyra ein av okkara kendastu tónleikabólkum.

Tá fer bólkurin Týr á pallin í Tb húsinum á Tvøroyri.

Týr sló rættiliga ígjøgnum í Prix Føroyum, tá ið teir framførdu teirra egnu útlegging av aldargamla kvæðnum, Orminum Langa, sum gjørdust ein rættilig landaplága og fekk ung og yngri upp á gólv, men Týr hevur eisini mangt annað at bjóða uppá.

– Tað, vit fara at spæla í TB húsinum í kvøld er tungt, og tað er føroyskt, sigur Poul Arne Holm, sangari í Týr.

Hann sigur, at tónleikurin hjá teimum er nógv kveiktur av føroysku kvæðunum og at tær tungu rútmurnar eru ofta at hoyra aftur í løgunum.

– Men sjálvsagt fara vit eisini at spæla Ormin langa, sigur hann.

Tað er ikki ofta, at Týr er á palli í Føroyum, men tað kemst av, at allir limirnir í bólkinum búgva niðri.

Nú Týr fer á pall á Tvøroyri, verður tað við nýggjum gittarspælara. Jòn Joensen hevur tikið seg úr bólkinum, tí hann hevur ikki stundir at spæla. Nýggjur gittarspælari er Terji Skibenæs, sum ikki er ókendur, tí hann hevur áður spælt í Flux.

Saman við Týr, fer eisini havnarbólkurin »Happy?« úr Havn at spæla í TB húsinum í kvøld. teir hava ikki verið so nógv frammi, men teir spæla heavy metal tónleik og skuldi hóska væl til eitt kvøld saman við Týr.



*Kendi bólkurin, Týr, sum fekk ung og yngri upp á gólv fyrr í summar við Orminum Langa, fer nú at hava eina av sínum sjáldsomu konsertum í Føroyum. Tað hendir, tá ið teir fara á pall í TB húsinum á Tvøroyri í kvøld*

**Nýggj fløga í januar**

Annars kunnu Týr fjepparar gleða seg til 10. januar, tí tá gevur Týr nýggja fløgu út.

Poul Arne Holm sigur, at teir hava verið í upptøkuhølunum og tikið fløguna upp og tónleikurin er hin sami, tungi, føroyski.

Átta løg eru á fløgunum og teir hava gjørt alt sjálvur og tað, teir ikki hava gjørt, hava teir lagt til rættis. Ikki minst verður hugsað um Ormin Langa, sum eisini er við á nýggju fløguni, men nú er hann tikin upp av nýggjum. Hini løgini eru nýggj, men tað skilst, at okkurt kvæði er eisini á fløguni. Tað er Tutl, sum gevur fløgua út.

Annars skilst at okkurt er á fløguni, sum fer at taka lurtararnar eitt sindur á bóli.

# Fleri ferðsluóhapp í fjør enn seinastu fimm árini

FERÐSLA
*Ingrid Bjarnastein*

378 ferðsluóhapp á landsvegi vórðu skrásett í fjør. Hetta er hægsta talið av ferðsluóhappum síðani 1995. Fægst ferðsluóhapp, í sama tíðarskeiði, vóru í 1997. Tá lá talið á 264 óhappum.

Hagtølini, sum eru tikin úr árbók fyri Føroyar 2001, siga eisini, at flest óhapp eru á Streymoynni. 161 av teimum 378 óhappunum vóru á Streymoynni, meðan Eysturoyggin er nummar tvey við 119 ferðsluóhappum. Fægst óhapp vóru á Sandoynni. Har vóru bert seks ferðsluóhapp í ár 2000.

Tilsamans vóru 21 fólk skadd í ferðsluni í fjør. Harav doyðu tvey. Seinastu fimm árini eru mest fólk deyð av ferðsluóhappum í 1999. Tá doyðu seks fólk. Bæði í 1995 og 1998 doyði ongin av ferðsluóhappum, og í 1996 doyði ein.

Tølini vísa eisini, at óhapp, ið eru orsakað av rúsdrekka eru eisini hægri enn seinastu fimm árini. Næstan dupult so nógv ferðsluóhapp vóru í fjør orsakað av rúsdrekka, enn árið frammanundan – 1999. Í 1999 lá talið á 11 og í fjør vóru heili 20 óhapp har rúsdrekka var blandað uppí. Fægst óhapp vegna rúsdrekka vóru í 1998; tá lá talið á átta.



